# Judo Føroyar
# Ársroknskapur fyri 2025

**Innihaldsyvirlit** **Síða**


| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 2 |
| Grannskoðaraátekning frá óheftum grannskoðara | 3 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 9 |
| Fíggjarstøða | 10 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Ársroknskapurin hjá Judo Føroyar fyri 2025 er góðkendur av nevndini.

Ársroknskapurin er gjørdur sambært vanligum reglum um góðan roknskaparsið.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skyldum, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Ársroknskapurin verður hervið lagdur fyri aðalfundin til góðkenningar

Tórshavn, hin 27. mai 2026

Petur Sigurd Johannesen
formaður

Kristianna Solberg á Túgvu
næstforkvinna

Sofus Debes Johannesen
kassameistari

Sanna Nolsøe Djurhuus
skrivari

Andrias Sumberg
nevndarlimur

*Fundarstjóri*

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til nevndina í Judo Føroyar***

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Judo Føroyar fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu. Ársroknskapurin er gjørdur sambært vanligum reglum um góðan roknskaparsið, umframt eftir "Reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025"

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2025 samsvarandi góðan roknskaparsið.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**
Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum".Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøða.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við góðan roknskaparsið. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**
Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðaralógini, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grann-skoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

Tórshavn, hin 27. mai 2026

**NUMO**

góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Bjarni Arnason

*góðkendur grannskoðari*

## Nýttur rokskaparháttur

Ársfrásøgnin er gjørd eftir niðanfyri ásettu roknskaparrelgum. Umframt eftir “Reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025”. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør. Ársfrásøgnin verður gjørd í donskum krónum (DKK). Allar upphæddir í ársfrásøgnini verða avrundaðar til heil tøl, og tí kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summi av teimum undirliggjandi tølunum.

**Um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða rakstrarførdar so hvørt, sum tær verða vunnar. Sama er við virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, ið hoyrir árinum til, við tíðaravmarkingum svarandi til roknskaparárið, verður rakstrarførdur við av- og niðurskrivingum, avsettum skyldum og afturføringum frá broyttum roknskaparligum metingum, ið áður eru innroknaðar í roknskapin.

Ognir og skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðarfíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virðið á ognunum og skyldunum kann metast álítandi. Ognir og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirðið, og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur sum gjøllari lýst niðanfyri.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðismettar til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, tá ið føst effektiv renta verður roknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður gjørt upp sum upprunaútveganarvirði við frádrátti fyri møguligum avdrátti umframt til-/frágongd fyri samlaðari amortisering av muninum ímillum útveganarvirði og áljóðandi upphædd.

Tá ið ognir og skyldur verða innroknaðar og virðismettar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við ársfrásagnarframløgu.

Møgulig marknaðarlig virðisminking á ognum í árinum verður mett ikki at verða varandi

## Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða staðfestar. Stuðul og aðrar sáttmálainntøkur verða tiknar við tá hesar eru játtaðar og verða tíðaravmarkaðar.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

## Nýttur roknskaparháttur

**Av- og niðurskrivingar**

Av- og niðurskrivingar fevna um ársins av-  og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og rentukostnaður.

**Skattur av ársúrslitinum**
Felagið er ikki undir skattskyldu.

## Fíggjarstøðan

Materiell støðisogn verður upptikin til útveganarvirði við frádrátti fyri samlaðum avskrivingum. Ella til endurvinningarvirðið, um tað er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Útveganarvirði eru kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at íløguni fram til, tá ið ognin verður tikin í nýtslu. Útveganarvirði fyri eina samlaða íløguogn verður býtt í ognarlutir, ið verða avskrivaðir hvør sær, um brúkstíðin av hvørjum ognarluti sær er ymisk.

Avskrivingar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð (livitíð) og ásett restvirði (scrapvirði) og verða gjørdar við eins upphæddum hvørt ár. Tilgongdir í árinum verða avskrivaðar frá keyps¬mánaði. Felagið hevur ásett hesar brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Rakstrartól | 10 ár | 10% |

Vinningur ella tap við sølu av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprís, frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virði søludagin og rakstrarført undir avskrivingar.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís.

## Nýttur  roknskaparháttur

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkað ogn er rakstrarkostnaður, ið hoyrir til komandi ár. Tíðaravmarkingar skyldur, er inngjøld sum viðvíkja inntøkum í komandi roknskaparári.

**Tøkur peningur**
Tøkur peningur er kassa-, gjaldskort- og innlánspeningur.

**Fremmand skuld**
Øll stuttfreistað skuld verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virðið roknskapardagin.

**Veð- og eventualskyldur**
Veð- og eventualskyldur verða upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í ársfrásøgnini.

## Rakstrarroknskapur 1. januar 2025 – 31. desember 2025

| | Notur | 2025 | 2024 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | |
| Landskassastuðul frá ÍSF | | 569.809 | 581.014 |
| Altjóðapuljan, stuðul | | 56.165 | 0 |
| Breiddarpuljan, stuðul | | 29.260 | 0 |
| Stuðul frá EJU/IJF | | 7.302 | 0 |
| Lýsingarinntøkur, landskappingin, menn | | 70.000 | 35.000 |
| Inntøkur Kontrast FM | | 8.133 | 0 |
| inntøkur fyri luttakarum/feløgum | | 57.628 | 85.981 |
| **Inntøkur íalt** | | **798.297** | **701.995** |
| **Kostnaðir** | | | |
| Starvsfólkakostnaður | **1** | -58.442 | 0 |
| Útreiðslur, landslið | **2** | -218.667 | -569.182 |
| Útreiðslur, lands- / FM-kappingin | **3** | -32.438 | -29.084 |
| Útreiðslur, til skeið | **4** | -145.077 | -86.043 |
| Útreiðslur, til altjóða fundir | **5** | -33.410 | -14.144 |
| Kontrast FM - felags roknskapur | **6** | -28.122 | 9.643 |
| Felagskostnaður | **7** | -35.552 | -35.313 |
| Fyrisitingarútreiðslur | **8** | -76.600 | -110.442 |
| Verkætlanir | **9** | -14.690 | 0 |
| **Kostnaður íalt** | | **-642.998** | **-834.565** |
| **Rakstrarúrslit** | | **155.299** | **-132.570** |
| Avskrivingar | **10** | -8.274 | -8.274 |
| **Úrslit, áðrenn fíggjarpostar** | | **147.025** | **-140.844** |
| Fíggjarkostnaður o.t. | | -226 | -1.070 |
| **Ársúrslit** | | **146.799** | **-141.914** |

## Fíggjarstøða pr. 31. desember 2025

| **OGN** | **Nota** | **2025** | **2024** |
|---|---|---|---|
| Mátta | | 60.699 | 68.973 |
| **Materiell støðisogn** | **10** | 60.699 | 68.973 |
| **Støðisogn** | | **60.699** | **68.973** |
| Skuldarar | | 30.219 | 38.582 |
| Forútgoldnar rokningar | | 4.445 | 4.382 |
| **Áogn** | | **34.664** | **42.964** |
| **Tøkur Peningur** | | **42.862** | **42.196** |
| **Ogn í umferð** | | **77.525** | **85.160** |
| **OGN SAMANTALT** | | **138.225** | **154.133** |
| **SKYLDUR** | | | |
| Eginogn | | -154.972 | -13.058 |
| Ársúrslit | | 146.799 | -141.914 |
| **Eginpeningur** | | **-8.173** | **-154.972** |
| Lán Gjáar Bókhaldsvirki | | 0 | 90.759 |
| Vøru- og tænastuognarar | | 62.568 | 218.345 |
| Skuld til nevndarlim | | 81.579 | 0 |
| Onnur skuld | | 2.251 | 0 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **146.398** | **309.105** |
| **Skuld** | | **146.398** | **309.105** |
| **SKYLDUR SAMANTALT** | | **138.225** | **154.133** |

## Notur

| Nota 1. Starvsfólkakostnaður | 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| Løn, fyrisiting | -50.000 | 0 |
| Eftirløn, fyrisiting | -6.050 | 0 |
| Lønartengd gjøld | -2.392 | 0 |
| | **-58.442** | **0** |

| Nota 2. Útreiðslur, landslið | | |
|---|---|---|
| **Utreiðslur, manslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -37.103 | -140.370 |
| Uppihald í útlandinum | -17.246 | -55.266 |
| Kostur í útlandinum | -1.851 | -6.608 |
| Annað | -7.073 | -11.291 |
| **Útreiðslur, Ungdóms kvinnulandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -60.727 | -110.982 |
| Uppihald í útlandinum | -10.483 | -18.130 |
| Kostur í útlandinum | -3.218 | -3.394 |
| Aðrar útreiðslur, ungdóms kvinnu-lið | -7.974 | -6.033 |
| **Útreiðslur, Ungdóms manslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -41.157 | -187.517 |
| Uppihald í útlandinum | -20.522 | -12.577 |
| Kostur í útlandinum | -6.892 | -7.281 |
| Annað | -4.421 | -9.732 |
| | **-218.667** | **-569.182** |

| Nota 3. Útreiðslur Lands- / FM-Kappingin | | |
|---|---|---|
| Heiðursmerkir | -7.088 | -7.619 |
| Annað | -25.350 | -21.465 |
| | **-32.438** | **-29.084** |

## Notur

| Nota 4. Útreiðslur til skeið | 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| Ferðing og koyring | -23.899 | -25.925 |
| Uppihald og kostur, skeiðshaldari v.m. | -9.270 | -12.495 |
| Tilfar | -690 | 0 |
| Annað | -2.019 | -620 |
| **Útreiðslur til dómaraskeið** | | |
| Ferðing og koyring, dómaraskeið | -11.265 | -19.757 |
| Uppihald til dómaraskeið | -6.016 | -16.805 |
| Aðrar útreiðslur til dómaraskeið | -543 | -1.358 |
| **Útreiðslur til venjaraskeið** | | |
| Kostnaður fyri skeiðshaldara, venjaraskeið | -30.663 | 0 |
| Ferðaútreiðslur | -37.014 | -3.161 |
| Aðrar útreiðslur | -14.642 | -4.770 |
| Kostir til venjaraskeið | -6.414 | -1.124 |
| Aðrar útreiðslur | -2.640 | -28 |
| | **-145.077** | **-86.043** |

| Nota 5. Útreiðslur til altjóða fundir | | |
|---|---|---|
| Ferðakostnaður | -19.799 | -4.584 |
| Uppihald | -12.491 | -9.409 |
| Annað | -1.120 | -151 |
| | **-33.410** | **-14.144** |

| Nota 6. Kontrast FM - felagsroknskapur | | |
|---|---|---|
| Stuðulsinntøkur | 20.000 | 20.000 |
| Atgongumerkir | 4.400 | 7.150 |
| Inngjald frá sersambondum | 56.250 | 30.000 |
| Sjónvarpsframleiðsla | -62.500 | 0 |
| Gjald fyri veitslu | 58.850 | 59.000 |
| Útreiðslur fyri veitslu | -82.949 | -85.665 |
| Rentur og bankakostnaður | -18 | 0 |
| Flutt til inntøkur | -8.133 | 0 |
| Annað | -14.022 | -20.842 |
| | **-28.122** | **9.643** |

# Notur

| Nota 7. Felagskostnaður | 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| Fundarútreiðslur | 0 | -223 |
| Umboðan | -3.977 | -1.614 |
| Limagjøld | -14.950 | -14.944 |
| Klæðir - Búnar | -2.651 | -6.780 |
| Heimasíða | -13.975 | -11.423 |
| Annað | 0 | -330 |
| | **-35.552** | **-35.313** |

| Nota 8. Fyrisitingarútreiðslur | | |
|---|---|---|
| Skrivstovuhald | -6.448 | -11.144 |
| Tól, teldur o.a. | 19.357 | -38.379 |
| Telefon, fax og internet | -5.865 | -11.291 |
| Bókhald | -18.000 | -18.000 |
| Grannskoðan | -20.594 | -21.563 |
| Flytingarprov. | -8.300 | -7.652 |
| Avseting í móti tapi av áogn primo | 17.738 | 0 |
| Avseting í móti tapi av áogn ultimo | -24.930 | 0 |
| Staðfest tap uppá skuldarar | -33.690 | 0 |
| Aðrar útreiðslur | 4.131 | -2.414 |
| | **-76.600** | **-110.442** |

| Nota 9. Verkætlanir | | |
|---|---|---|
| Falltrygd fyri eldri | -14.690 | 0 |
| | **-14.690** | **0** |

## Notur

| **Nota 10. Støðisogn** | **2025** | **2024** |
|---|---|---|
| Útveganarvirði, primo | 91.932 | 91.932 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| útveganarvirði, ultimo | 91.932 | 91.932 |
| Avskrivað, primo | -22.959 | -14.685 |
| Avskrivað í árinum | -8.274 | -8.274 |
| Avskrivað ultimo | -31.233 | -22.959 |
| **Virði 31.12** | **60.699** | **68.973** |

**Nota 11. Veðsetingar og eventualskyldur**

Sersambandi hevur ongar veð- ella eventualskyldur við roknskaparlok.